# NMT steðgar ikki við ársskiftið

**Útróðrarmenn og aðrar brúkarar av NMT-skipanini nýtast ikki at stúra fyri samskiftinum. Føroya Tele hevur avgjørt, at NMT-skipanin verður verandi eina tíð aftrat, hóast trupult er at útvega eykalutir og ráðgeving.**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*

**Samskifti:** - Nei, hvat sigur tú? Er tað sannheit? Hatta vóru góð tíðindi hjá okkum útróðrarmonnum at hoyra!

Fyrrapartin í gjár var útróðrarmaðurin Mortan Johannesen í Havn rættiliga harmur og undrandi, tá talan var um NMT-skipanina. Hetta gav hann eisini týðiliga úttrykk fyri í Sosialinum í gjár.

Gekst soleiðis sum Føroya Tele hevði ætlað, so skuldi henda skipanin niðurleggjast á nýggjárinum. Og fyri útróðrarmenn var hetta eitt rættiliga stórt bakkast í møguleikanum at kunna samskifta við land og við aðrar bátar.

Í hesum samskiftinum lá eisini tann neyðugi møguleikin hjá útróðrarmonnum at kunna fáa tey nýggjastu veðurtíðindini umvegis telefonina frá Veðurstøðini í Havn.

Seinnapartin í gjár fréttust kortini tey tíðindini, at Føroya Tele hevði broytt ætlan: NMT-skipanin verður ikki niðurløgd við ársskiftið, men fyrst, tá komið er nakað út í komandi ár.

Fyri Mortan og aðrar útróðrarmenn vóru hetta góð tíðindi. Hóast GSM-skipanin røkkur langt, so er NMT-skipanin kortini hon, sum roynist einabest, og sum teir føla seg bestar við.

- Jú, hatta var gott at hoyra, sigur hann.

### Gomul skipan

Richard Mortensen, stjóri í FT Samskifti sigur við Sosialin, at orsøkin til ætlanina at niðurleggja NMT er rættiliga einføld:

Tað vísir seg eisini at vera rættiliga trupult at fáa bæði eykalutir og ráðgeving í tekniskum spurningum til NMT-skipanina.

Hetta hava tey longu sæð í grannalondum okkara, og er henda skipanin tí longu niðurløgd bæði í Danmark, Svøríki og Noregi fyri tíð síðani.

Enn er henda skipanin so virkin í Føroyum, men ikki so øgiliga leingi aftrat.

Stjórin í FT Samskifti upplýsir, at ætlanin er at NMT-skipanin skal virka eisini eftir nýggjár og nakrar mánaðir inn í nýggja árið. Samstundis við hetta verður arbeitt við at víðka um útbreiðsluøkið av GSM-netinum.

Støðan í dag er hon, at GSM røkkur millum 70 og 90 kilometrar úr landi, onkustaðni upp í 120. NMT røkkur 80 til 100 km., og VHF einar 110 km. úr landi.




*Útbreiðslukort yvir GSM-skipanina kring landið. Tey gráu økini vísa útbreiðsluna av vanligum GSM, meðan grøna økið vísir útbreiðsluna av langtrøkkandi GSM*
*(Mynd: Føroya Tele)*



*Mortan Johannesen kann nú nýta NMT-skipanina eina tíð aftrat - nakað væl út í komandi ár, samstundis sum fólk frá Føroya Tele arbeiða við at betra um GSM-netið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Kári fegnast

Tað var annars tingmaðurin, Kári P. Højgaard sum á sinni tók hetta málið upp í løgtinginum.

Í mars mánaði ? t.v.s. um somu tíð sum tíðindini um niðurleggingina av NMT bórust ? hevði hann ein munnligan fyrispurning viðvíkjandi NMT 450.

- Tað vísti seg tá, at her var lítið og einki at gera. NMT mátti niðurleggjast á nýggjárinum.

- Men at ein nú hevur útsett hetta, samstundis sum ein arbeiðir við at betra um GSM-skipanina, tað gleðir meg nógv, sigur Kári P. Højgaard í stuttari viðmerking.

Hann hevur annars sett sær fyri at heita á fiskimálaráðharran, Bjørn Kalsø um at varðveita NMT, til GSM-skipanin verður fult útbygd og kann hoyrast allastaðni.

### Víðka útbreiðsluøkið

Tíðliga í ár kunnaði nevniliga Føroya Tele allar kundar sínar um hesar ætlanirnar.

Sagt varð í hesum skrivinum, at fyritøkan arbeiddi við at víðka um útbreiðsluøkið av GSM á havøkjunum kring oyggjarnar.

Víst varð á, at tríggjar støðir vóru settar upp: Á Klubbanum í Fugloy, á Knúki í Mykinesi og á Spáafelli í Suðuroynni.

Hesar støðir røkka út á 43 og 54 fjórðingar úr landi. Samstundis er tað ein sannroynd, at góðskan á samrøðunum er munandi betri við GSM enn við NMT.

Í skrivinum varð eisini sagt, at vanligar GSM-telefonir kunnu nýtast longri út enn áður. Hinvegin kundi verða neyðugt við eykaútgerð nærhendis markinum fyri útbreiðsluna av skipanini.

Richard Mortensen vísir á, at tað serliga er á ávísum støðum heilt inni við land at GSM-skipanin ikki hoyrist so væl.

- Men hetta er eisini ein partur av tí arbeiðinum, sum vit nú eru í ferð við at gera, sigur hann.

Nú er so varið givið til áheitanina á hesi síðuni!

# Hækka skattin við 1 %

**Vestmenningar fara næsta ár at gjalda 1 % meiri í skatti. Ein av orsøkunum eru tær øktu uppgávurnar, sum kommunan hevur fingið álagt**

SKATTUR
*Snorri Brend*

**Vestmanna:** Á bygdaráðsfundi í Vestmanna í farnu viku var fíggjarætlanin fyri 2006 til viðgerð á fyrsta sinni.

Í hesi viðgerðini varð samtykt eitt uppskot frá fíggjarnevndini um at verandi skattaprosent uppá 21 skal hækka komandi ár upp í 22.

- Landið hevur lagt fleiri uppgávur út á kommunurnar. Skulu vit hava ráð at gjalda fyri hesar, og samstundis hava pening til íløgur, so var neyðugt við hesi hækkingini.

- Vit ynskja bara at binda um heilan fingur, sigur Karl A. Olsen, bygdaráðsformaður við Sosialin.

Ein partur av hesum øktu útreiðslunum eru øktar útreiðslur til umsitingina, eins og Sambýlið í bygdini fer at kosta kommununi 560.000 kr. í komandi ári.

Fíggjarætlanin fyri Vestmanna kommunu er ikki endaliga samtykt enn. 2. viðgerð av hesi verður komandi týsdag.

Tað er kortini greitt, at skattaprosentið fer at hækka.

Og tað sama fer eisini foreldragjaldið fyri at hava børn síni í dagstovninum. Tað hevur verið 1500 kr., men verður komandi ár hækkað upp í 1600 kr. um mánaðin.